# Eg vil giftast!

Á TvDanmark leygardagin kl. 17.05



*Giftarsendingin, "Eg vil giftast!", á TvDanmark. Har er tó eingin trygd fyri, at endin altíð er so lukkuligur*

"Eg vil giftast!" er ein australsk realitysending við veruligum ástarløtum. Stutt sagt, so er meiningin við sendingini, at pørini í sendingini skulu taka støðu til ein tann mest avgerandi spurningin í teirra lívi, beint fyri opnum skíggja: Nevniliga, um tey vilja ganga saman í hjúnarband við unnustanum/unnustini, ið frammanundan hevur lagt hópin av orku í fyrireikingina til stóra spurningin. Tann, ið fær gylta spurningin, fær ein hvøkk - men hóast myndatólini eru til staðar, so er eingin trygd fyri at tann, ið ber bónarorðini fram, fær játtandi svar. Lagt verður hvørja ferðina upp til, at endin skal gerast lukkuligur og romantiskur - umstøðurnar eru í øllum førum til tað. Men hetta er als ikki tað, sum hendir í hvørjum innslagnum í sendingini. Hyggjarin svølgir gjarna tungt, tá fríggjarin fær eitt turt nei, alt meðan myndatól og onnur gløða. Í 2. parti síggja vit m.a. Elizabeth og hennara unnusta Chris. Djór, serliga delfinir, hava nógv at siga fyri Elizabeth. Tí ætlar Chris at spyrja um hond hennara á einum stórslignum delfinshowið. Elizabeth heldur seg hava vunnið ein túr til Seaworld, men í veruleikanum er Chris í loyndum sloppin at luttaka í tí stóra delfinshownum. Hann ætlar at koma brádliga til hana og seta henni stóra spurningin. Randall elskar Simone. Hann vil giftast við henni. Hann setir sær tí fyri at gera seg sjálvan til prinsin á hvíta hestinum, við stórum fylgi og øllum. Hetta hevur við sær, at allur vegurin kring ein heilan húsablokk skal steingjast, og eitt orkestur skal leigast. Simone fær so líðandi illgrunan, tá ein kareta kemur eftir henni.

---

Á 3+ hóskvøldið kl. 20.00

# Black Hawk Down

Hin mæti filmsleikstjórin Ridley Scott er maðurin aftanfyri hendan krígsfilmin. Filmurin er grundaður á ein nærum gloymdan part av amerikanskari hernaðarsøgu. Hin 3. oktober í 1993 verður ein hernaðarlig úrvalsdeild, ið telur yvir 100 Delta Force hermenn send til tað Somalia har borgarakríggj ræður.



*Black Hawk Down - ein reinur krígsfilmur, ið er grundaður á veruligar hendingar*

Frammanundan eru eisini friðarveitandi ST-herdeildir komnar til landið. Uppgávan hjá amerikansku hermonnunum er at ræna tveir týdningarmiklar loytnantar hjá krígsharranum í stórbýnum Mogadishu, Mohamed Farah Aidi. Í úrvalsdeildini eru millum aðrar Grimes (Ewan McGregor), Sersjantur Matt Eversmann (Josh Hartnett), Ranger Lt. Col. Danny Mcknight (Tom Sizemore) og so hin útspekuleraði Delta Serjsanturin Jeff Sanderson (William Fichtner). Grimes hoyrir heima aftanfyri skrivstovuborðið, men hann fær ovmikið at hugsa um, nú hann endar úti á stríðsvøllinum. Støðan gerst av álvara vandamikil, tá tvær av stríðstyrlunum verða skotnar niður. Mitt í somaliska stórbýnum Mogadishu gerst støðan alsamt hættisligari. Amerikanararnir verða kringsettir av fíggindanum, og ein 15 tíma, náðileysur bardagi byrjar.



*Alt gongur ikki sum ætlað, tá ein servand herdeild kemur inn í somaliska høvuðsstaðin Mogadishu, har ruðuleiki og borgarakríggj valdar*